## Maradona kann enda í geglinum

Enn eina ferð er rok um argentinska landsliðsvenjaran, Diego Maradona. Eftir tí, sum frættist úr Argenina, so er Maradona rýmdur frá einari bilvanlukku, har tveir persónar vóru løstaðir. Maradona skal hava koyrt inn í eina telefonkiosk, og glassplintruni frá stoytinum raktu tvey fólk til gongur. – Bilurin koyrdi óstøðugt, kom uppá gonguteigin og koppaði telefonkioskini. Vit fingu skaða av knústa glasinum, fortelur annað av teimum skaddu fólkunum fyri argentinskum fjølmiðlum. Maradona noktar kortini fyri, at hann koyrdi bilin. – Eg sá Maradona og tveir aðrar menn fara frá bilinum, greiðir eitt eygnavitni frá. Maradona hevur fingið boð um at møta í rættinum, fyri at fortelja um hendingina.



## Danny aftur á Argjum

Danny Rasmussen verður annar av málverjunum, sum skal stríðast um plássið í málinum hjá AB hetta kappingarárið, tí hann skal nú aftur royna seg á Argjum. Tað skrivar heimasíðan hjá AB. Danny Rasmussen spældi í 2007 og fram til summarsteðgin í fjør á Argjum, tá hann skifti til HB. Men nú skal hann aftur kappast um málverjaplássið hjá AB. – Eg eri argjamaður, uppvaksin í AB, og her hoyri eg til, sigur Danny Rasmussen við heimasíðuna. Heðin Stenberg vardi málið hjá argjamonnum í fjør.

# Liverpool koppaði Real í Madrid

**Yossi Benayoun gjørdist í gjárkvøldið matchvinnari fyri Liverpool, sum á útivølli sigraði á Real Madrid. Og Bayern München er væl á veg í fjórðingsfinalurnar.**

CL-FÓTBÓLTUR

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Yossi Benayoun fegnast saman við liðfeløgunum um sigursmálið, sum Liverpool fekk á útivølli ímóti Real Madrid, tá bara átta minuttir vóru eftir at spæla*

*Mynd: AFP*

Tað einasta, sum kann sigast við rættiligari stórari vissu eftir tær fýra áttandapartsfinalurnar, sum vóru spældar í Champions League í gjár, er at Bayern München við 99 prosents vissu hevur vunnið sær sæti í fjórðingsfinaluni. Franck Ribery og Luca Toni skoraðu tvær ferðir í part og Miroslav Klose eina ferð, tá Bayern knústi Sporting á útivølli í Lissabon. 5-0 vann Bayern, eftir hálvleiksstøðuna 1-0.

Ísraelski landsliðsspælarin, Yossi Benayoun, gjørdist stóra hetjan, tá hann stútaði sigursmálið til 1-0 fyri Liverpool í útidystinum ímóti Real Madrid. Liverpool stendur nú við einum sera góðum møguleika ímóti kongafelagnum úr Madrid, sum síðstu fýra kappingarárini er sligið út í júst áttandapartsfinaluni.

Chelsea vann eisini 1-0 á Stamford Bridge ímóti Juventus. Sigursmálið fall longu eftir spæl í 12 minuttir, og var tað enn eina ferð fílabeinsstrandingurin, Didier Drogba, sum skoraði fyri Chelsea.

Villareal hevði ikki sørt av hepni við sær, at sleppa við einum 1-1 javnleiki á heimavølli ímóti grikska Panathinaikos, sum eftir einum tíma kom á odda við vøkrum langskoti frá Giorgios Karagounis. Eina løtu seinni fekk Villareal eitt heldur ivasamt brotsspark, sum Giuseppe Rossi setti í netið til endaliga úrslitið 1-1.

Liðini spæla returdyst týskvøldið 10. mars.

### Úrslit úr Champions League

**Sporting Lissabon-Bayern München 0-5 (0-1)**
0-1 Franck Ribery, 42. min.
0-2 Miroslav Klose, 57. min.
0-3 Franck Ribery (brotsspark), 63. min.
0-4 Luca Toni, 84. min.
0-5 Luca Toni, 90. min.

**Chelsea-Juventus 1-0 (1-0)**
1-0 Didier Drogba, 12. min.

**Real Madrid-Liverpool 0-1 (0-0)**
1-0 Yossi Benayoun, 82. min.

**Villareal-Panathinaikos 1-1 (0-0)**
1-0 Giorgios Karagounis, 59. min.
1-1 Giuseppe Rossi (brotsspark), 67. min.

Mjølnir-ÍF 1-3 (25-17, 22-25, 20-25, 14-25)

# ÍF-kvinnurnar fara eftir heiðursmerkjum

**Við 3-1 sigri á Mjølni á útivølli í gjárkvøldið blandar ÍF seg millum liðini, ið dyrgja eftir silvuri ella bronsu í Eik-liguni hjá kvinnum í flogbólti**

FLOGBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*

Undan dystinum í Klaksvík í gjárkvøldið hevði Mjølnir møguleikan at bjóða av heilt har frammi, men í staðin gjørdist tað ÍF, ið tók møguleikan og kom upp á síðuna av Mjølni.

SÍ er longu farið við gullinum, so nú eru tað Fleyr, Mjølnir, ÍF og Dráttur, ið dystast um silvurið og bronsuna, og tað merkir, at tvey av hesum fara at sita eftir við ongum.

Hóast ÍF byrjaði betri í fyrsta setti, var tað skjótt, at Mjølnir fór framum og helt við góðum spæli fast um leiðsluna og vann settið.

Í øðrum setti fylgdust liðini allan vegin uppeftir, og hóast Mjølnir var á odda 19-17, servaði ÍF seg uppá 20-23 og endaði við at vinna settið, sum kundi farið báðar vegir.

Bæði ferð og spenningur fóru úr dystinum í triðja og fjórða setti, og ÍF kundi lutfalsliga trygt stýra gongdini og vinna bæði settini og dystin. Serliga í fjórða setti var ÍF klárt betri enn Mjølnir, sum ikki megnaði at svara aftur.

## FM í flogbólti fyri tey yngru

Leygardagin verða Gundadalshøllin, Hoyvíkshøllin og Ítróttarhøllin á Hálsi karmur um FM-kappingarnar hjá teimum yngru deildunum í flogbólti.

Tá tilmeldingarfreistin var úti í gjárkvøldið, vóru 89 lið úr níggju feløgum meldað til í deildunum 10, 12 og 14 ár hjá bæði gentum og dreingjum, umframt í deildunum kvinnu- og mansunglingar.

Feløgini Dráttur, Fleyr, ÍF, KÍF, Mjølnir, Nøvan, SÍ og TB eru við, men serliga frøast fyrireikararnir um, at B68 sum nýtt felag hevur heili sjey lið við hjá gentum og dreingjum 12 ár.

Lagt verður til brots leygarmorgunin klokkan níggju, og hjá teimum 10 og 12 ára gomlu verður alt avgreitt henda dagin, so føroyameistararnir verða funnir.

Hjá gentum og dreingjum 14 ár og hjá kvinnu- og mansunglingum bíða avgerðirnar í tvær vikur, tí tær finalurnar verða spældar í Trongisvági 13. og 14. mars.

**hil**

# Tvørámenn gera hál í billard

**Klaksvíkar Klubbi tapti so dyggiliga á Tvøroyri herfyri, men kortini liggur fyrstaliðið hjá klaksvíkingum klárt á odda í billardkappingini**

BILLARD

Føroyameistarakappingin í billard fyri lið er nú komin umleið í helvt. Kappingin byrjaði við at Mimir legði seg á odda. Síðani tóku klaksvíkingar dyk á seg og løgdu mimirsmenn aftur um seg, og nú hevur so enn eitt felag tikið hini á bóli. Tað er Tvøroyar Billardfelag, sum ikki hevur verið við í fleiri ár.

Tvøramenninir Max Rasmussen og Óli Joensen høvdu vitjan av báðum liðunum hjá Klaksvíkar Billardfelag seinasta vikuskifti. Og tað vóru fýra klaksvíkingar, sum vórðu tungir í huga, tá teir sunnudagin máttu fara longu leiðina heimaftur. Tvøroyar Billardfelag vann nevniliga 6-2 á Klaksvíkar Billardfelag 1 og 8-0 á Klaksvíkar Billardfelag 2.

So væl gekk ikki hjá tvørámonnum, sum vitjaðu í Klaksvík herfyri, tí tá vann Klaksvíkar Billardfelag 1 8-0 á Tvøroyrar Billardfelag, og annaðliðið hjá klaksvíkingum spældi javnt 4-4 móti tvørámonnum.

### Mimir til Klaksvíkar

Mimir fær í kvøld vitjan av Klaksvíkar Klubba 1. Spurningurin er so, um veteranarnir, Kristian Sune Høgnesen og Sonhard Johannessen, eru komnir yvir skelkin, teir fingu á Tvøroyri. Hetta er fyrtu ferð í hesi kappingini, at bestu liðini hjá klaksvíkingum og mimirsmonnum møtast. Mimir hevur bert spælt tveir dystir higartil, og tí kann úrslitið av hesum dysti verða rættiliga avgerandi fyri bæði liðini.



Støðan í FM kappingini í billard er nú tann, at Klaksvíkar Klubbi 1 liggur klárt á odda við 24 stigum fyri fýra dystir. Næstfremst er Tvøroyar Billardfelag við 18 stigum fyri fýra dystir, síðani er Mimir nummar trý við 14 stigum fyri tveir dystir, Havnar Klubbi nummar fýra við 10 stigum fyri tríggjar dystir og aftast er Klaksvíkar Billardfelag 2 við seks stigum fyri fimm dystir.